## VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og avfall, mest sum kavi. Hitalagið millum ÷1 og +2 stig.




**Veðrið leygardagin**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og stundum regn ella vátakavi. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Hvassur vindur ella skrið av landnyrðingi og stundum regn ella vátakavi. Hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Hvassur vindur ella skrið av norði og útnyrðingi og ælingur, mest sum kavi, men eisini onkur sólglotti. Hitin millum 1 og 5 stig.

# Øll kunnu taka undir við null-hugsjónini

**Vinnumálastýrið fer nú at viðgera uppskotið frá Ferðslutrygd um at seta null-hugsjónina sum ferðslupolitiska stevnu**

FERÐSLUTRYGD
*Eirikur Lindenskov*

– Løgtingið eigur at samtykkja uppskotið um at nýta null-hugsjónina sum ferðslupolitiska stevnu. Men tað krevur, at løgtingið eisini er sinnað at játta neyðugu pengarnar.

Hetta sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum.

Í blaðnum Bilar, sum var í Sosialinum í gjár, sóu vit, at fráfarni formaðurin í Ferðslutrygd, Petur Jacob Sigvardsen, harmaðist um, at arbeiðsbólkur, settur í Vinnumálastýrinum, ikki var farin til verka enn, hóast Ferðslutrygd fyri fleiri árum síðani hevur heitt á Vinnumálastýrið um at seta null-hugsjónina sum ferðslupolitiska stevnu.

– Hatta má eg taka á mín kappa. Orsøkin er, at starvsfólkið í Vinnumálastýrinum hevur havt so nógv at gera, at stundir ikki hava verið at gjørt hatta arbeiðið, sigur Bjarni Djurholm, sum leggur dent á, at tað ikki er av tvørrandi vilja, at arbeiðsbólkurin, sum skuldi viðgera ferðslulógina annars, ikki er farin til verka. Hann vil hava hetta arbeiðið í gongd sum skjótast, so tað ikki aftur ganga 17 ár til broytingar verða gjørdar í ferðslulógini.

Á ársfundinum hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd varð samtykt at heita á landsstýrismannin um at leggja álitið, »Ávegis til null-hugsjónina«, sum Ferðslutrygd hevur gjørt, fyri tingið sum uppskot til samtyktar um ferðslupolitiska stevnu.

Bjarni Djurholm, sum var við á fundinum sigur, at ymsir spurningar vórðu reistir, eitt nú vildu kommunurnar vita, hvørjar avleiðingar hetta fór at fáa fyri tær.

– Vit fara nú at arbeiða víðari við hesum uppskotinum í Vinnumálastýrinum. Vit fara at tosa við ymsu partarnar í málinum, so sum Landsverkfrøðing, løgreglu, kommunu o. o., ið hava við ferðslu og ferðslutrygd at gera. Hetta mugu vit gera, tí í viðmerkingunum til uppskotið skulu vit siga, hvørjar avleiðingarnar uppskotið fær, sigur landsstýrismaðurin.

Bjarni Djurholm sigur, at uppskotið helst verður lagt fram sum uppskot til samtyktar. Uppskotið verður helst broytt samsvarandi tí, nevnt er omanfyri, men tað verður við null-hugsjónini sum grundstevnu, sigur Bjarni Djurholm.

*Bjarni Djurholm heldur tað verða rætta at seta sær null-hugsjónina, sum sigur, at eingin skal doyggja ella verða álvarsliga skaddur í ferðsluni, sum ferðslupolitiska stevnu. Men ger løgtingið tað, má tað eisini verða sinnað at lata neyðugu játtanirnar til ferðslutrygt vegakervið, sigur hann*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 2 |
| Nuuk | – |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | – |
| Saint John's | 11 |
| Halifax | 10 |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 8 |
| London | 15 |
| Tromsø | 2 |
| Bergen | 7 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 17 |
| Keypmannah. | 14 |
| Helsinki | 7 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 22 |
| Kiev | 21 |
| Bukarest | 26 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 16 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 20 |
| Athen | 21 |
| Malta | 22 |
| Tunis | 28 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 17 |
| New York | 18 |
| Miami | 22 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 32 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1000 hPa. yvir Írlandi fer spakuliga vestureftir. Eitt lágtrýst, tekur seg upp sunnan fyri Ísland.




Lágtrýstið sunnan fyri Ísland stendur mestsum í stað og dýpist. Eitt hátrýst, 1028 hPa. yvir Grønlandi breiðir seg í landsynning.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 30/04 kl. 06⁰⁰– 01/05 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 3,8°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 30/04 kl. 06⁰⁰–01/05 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í apríl: 41,9 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

1. mai: Tendring/Mánin longst frá jørðini
9. mai: Fyrra kvarter

Kelda: Almanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. mai | 08.10 | 20.30 | 07.10 | 19.30 | 07.25 | 19.45 | 10.10 | 22.30 | 11.10 | 23.30 | 06.25 | 18.45 | 05.25 | 17.45 | 08.25 | 20.45 | 09.25 | 21.45 | 07.55 | 20.15 | 09.10 | 21.30 |
| 3. mai | 08.50 | 21.11 | 07.50 | 20.11 | 08.05 | 20.26 | 10.50 | 23.11 | 11.50 | — | 07.05 | 19.26 | 06.05 | 18.26 | 09.05 | 21.26 | 10.05 | 22.26 | 08.35 | 20.56 | 09.50 | 22.11 |
| 4. mai | 09.33 | 21.55 | 08.33 | 20.55 | 08.48 | 21.10 | 11.33 | 23.55 | 00.11 | 12.33 | 07.48 | 20.10 | 06.48 | 19.10 | 09.48 | 22.10 | 10.48 | 23.10 | 09.18 | 21.40 | 10.33 | 22.55 |
| 5. mai | 10.17 | 22.40 | 09.17 | 21.40 | 09.32 | 21.55 | — | 12.17 | 00.55 | 13.17 | 08.32 | 20.55 | 07.32 | 19.55 | 10.32 | 22.55 | 11.32 | 23.55 | 10.02 | 22.25 | 11.17 | 23.40 |

5 707265 100050 >